Hin vælkenda Andrea, formaður í Havnar Arbeiðskvinnufelag

Andrea Árting heiðurslimur í Fuglafjarðar Arbeiðskvinnufelag

Nú um dagarnar frættist, at nevnd Havnar Arbeiðskvinnufelags var boðin til 1. mai-dagshald í Fuglafirði, har formaðurin, Andrea Árting, var annar av røðarunum, og á hesum sama degi gjørdi Fuglafjarðar Arbeiðskvinnufelag Andreu til heiðurslim, og tí hava vit frá blaðnum leitað niðan á Heygsbreyt 6 fyri at fáa eina samrøðu.

Blíð og týð tekur Andrea ímóti okkum í sínum hugnaliga heimi, og tá myndirnar eru tiknar, fáa vit ein góðan drekkamunn, og so byrja spurningarnir.

Barnaárini

Vit: Lat okkum fyrst hoyra um barnaárini.

Andrea: Ja, eg eri borin í heim tollaksmessudag í árinum 1891 úti á Rættará, og har hevði eg míni fyrstu barnaár í einum góðum heimi. Tá sá Havnin sjálvsagt nógv øðrvísi út enn í dag. Fólkið stríddist og strevaðist fyri dagligum breyði. Konurnar hjá arbeiðsmonnum vóru noyddar at hjálpa til við fortjenastuni. Tær gingu í fisk ella arbeiddu á fabrikkini.

Vit: Hvussu stór var kvinnulønin tá?

Andrea: 8-10 oyru í tíman, og arbeiðsdagurin byrjaði kl. 6 ella 7 á morgni og endaði kl. 18 ella 19 á kvøldi.

Vit: Merktist nakað til stættarmun?

Andrea: Sjálvandi var stættarmunur, um ikki varð hugsað so nógv um tað. Men serliga hetta, at arbeiðsmaðurin ikki hevði ráð at lata síni børn í realskúla, var nakað, sum setti seg fast.

Vit: Vit havnafólk hava altíð verið so góð við kommunuskúlan, hvussu var hann tá?

Andrea: Framúr góður, tað var tað, ið hjálpti okkum, vit blivu ikki eftirbátur.

Vit: Tá barnaárini vóru av, so fórt tú í vinnu?

Andrea: Ja, fyrst var eg fermd, ikki varð stór veitsla hildin tá við døgurða og øðrum. Fadrar og familja kom at gratulera, og fekk tú 10 kr., var tað ein øgiliga stór gáva. Vit mugu minnast til dagløninа, ið tá var umleið 2 kr. So var at fara at arbeiða, og nógv var ikki í at velja. Eg fór í fisk hjá Skibsted úti á Rundingi. Um veturin arbeiddi eg á fiskabollafabrikkini hjá Valdemar Lützen

Sanatoriið

Seinni gjørdist eg sjúk og kom á Sanatoriið og lá har í 1 1/2 ár, men bleiv tíbetur frísk aftur. Seingjapláss var til 32 sjúklingar. Kommunulæknin í Havn var lækni haruppi, tá var tað dr. Jensen. Av starvsfólkunum vóru tær vælkendu frk. Flagstad og frk. Berg, ávikavist yvirsjúkrasystir og økonoma. Stovugenturnar vóru Annelisabeth hjá Harald á Bakkanum og Anna og Malla hjá Knút skómakaranum og Tomasia hjá Vang í Kaldbak, so vóru eisini 2 køksgentur. Sjúkrasystranæmingur var Sigrid hjá Gustu. Hetta var alt starvsfólkið til hesar 32 sjúklingarnar.

Danmark

Aftaná at eg var frísk, fór eg til Danmarkar at tæna, fyrst hjá einum bakarameistara í 1 ár, so hjá einum fulltrúa í einum ministerii, síðani á einum háskúlaheimi í København saman við føroyskum gentum. Háskúlaheimið var eitt gistingarhús, har m.a. landstings- og fólkatingsmenn búðu, og eisini búðu ung fólk har, sum lærdu. Arbeiðstíðin var annanhvønn dag frá kl. 6—19 og annanhvønn frá 7 til 23. Lønin var 25 kr. um mánaðin.

Kona og mamma

Í 1922 giftist eg við Jóanesi, ættaður av Toftum, hann var skipari, men eisini arbeiddi hann á landi sum arbeiðsmaður. Vit fingu 4 børn, og tíð mína gav eg teimum. Álíkavæl fylgdi eg við í tí, sum var uppi í tíðini, serliga hevur politikkur havt mín áhuga.

Vit: Hvussu komst tú inn í fakfelagsrørsluna?

Havnar Arbeiðskvinnufelag

Hetta felag var stovnað í 1936. Høvuðsmaðurin aftanfyri hetta tiltak var Niels Ejdesgaard, sum eisini gjørdi felagsins lógir. Fyrsti formaðurin var vist Thora Poulsen. Men í 1937 kom Hjalt, táverandi formaður í Havnar Arbeiðsmannafelag til mín og bað meg koma at vera við í arbeiðskvinnufelagnum. Vit høvdu aðalfund uppi á loftinum hjá Havnar Arbeiðsmannafelag, og

Framhald á síðu 7

HORNIÐ

Bilur koyrdi á gøtuskelti

Herfyri setti býráði í Havn upp gøtuskelti ymsastaðni í býnum. Tað vísir seg, at fólki yvirhøvur er væl nøgt við hesi skelti. Men tó ikki øll. Fleiri av skeltunum vera niðurskrødd. Myndin omanfyri sýnir gøtuskelti við Jóannes Paturssonargøtu, sum nú um dagarnar var niðurkoyrt av einum bili.

trý á gøtuni

Hvat eigur at vera gjørt fyri at bøta uppá vegirnar í Havn?

Harry Larsen, bilmekanikari:
Fyri tað fyrsta skuldi bann verið sett fyri innflutningi av tungum bílum. Harnæst haldi eg, at vegirnir skuldu verið stoyptir.

Katrina Carlsen, starvskvinna:
Tað loysir seg ikki at bøta uppá holini í vegunum. Vegirnir áttu at verið gjørdir av nýggjum.



Ólavur Hansen, vøruvognskoyrari:
Teir stóru bilarnir áttu at verið fluttir út um býin, so høvdu vegirnir í Havn ivaleyst hildið betur.